

# VILDI VERÐA TIMBURMAÐUR OG GJØRDIST **VITANARSTJÓRI**

HANN ER **38** ÁRA GAMAL, EIGUR FIMM BØRN, OG Í **FIMM** ÁR HEVUR HANN VERIÐ FREMSTA ALMENNA **RØDDIN** HJÁ FØROYSKUM **LÆRARUM**. NÚ ER HANN FARIN FRÁ SUM **FORMAÐUR** Í FØROYA LÆRARAFELAG, TÍ **MENTAMÁLARÁÐIÐ** Í VIKUNI SETTI HANN SUM **STJÓRA** Á NÝGGJUM **VITANARSTOVNI** Í SKÚLAVERKINUM. **MAGNUS TAUSEN** ER VORÐIN ÍMYNDIN UM FØROYSKAN **SKÚLASKAP**, MEN Í FÓLKASKÚLANUM **DROYMDI** HANN BARA UM AT SLEPPA AT **SMÍÐA**



SAMRØÐA
Uni Arge
uniarge@gmail.com

Ongin, sum hevur hoyrt hann úttalað seg alment, hevur ivast í, at hann brendi fyri síni sak.

Í Mentamálaráðnum hava tey uttan iva ofta suffað um hansara áhaldni, tí við Magnusi Tausen hevur Føroya Lærarafelag havt ein formann, sum bæði hevur dugað at orðað seg greitt og grundgivið fyri sínum sjónarmiðum.

Men so hendi nakað.

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, skuldi brúka ein nýggjan stjóra at leggja Føroya Skúlabókagrunn, Landsmiðstøðina fyri undirvísingaramboð og KT-depilin saman í ein nýggjan vitanarstovn, og tá hon kagaði í rúgvuna við umsóknum, sá hon navnið hjá Magnusi Tausen.

Hon ivaðist neyvan í, at hann var skikkaður sum umsøkjari, tí hon kendi hansara dygdir. Tá hon so skilti, at hon eisini kundi prika luftina úr Føroya Lærarafelag eina løtu, tók hon av møguleikanum og setti Magnus Tausen í sessin.

## Hvør grein eftirkannað

Magnus Tausen bregður ikki úr ætt, tá tað snýr seg um áhugan fyri lærdómi og skúla. Foreldur hansara, Svenning og Amy Tausen, hava bæði tænt trúliga í skúlaverkinum og á mentanarpallinum í mong áratígggju. Hetta hevur eisini givið honum nógvan íblástur.

– Heima tosaðu vit altíð um bøkur, mál og skúla, og nógv skúlafólk komu á gátt hjá okkum. Vit tosaðu so nógv um bøkur og mál, at hvørja ferð eg skrivi eina grein alment, fái eg mammu og pápa at lesa hana ígjøgnum, so málburðurin er í lagi. Hesin vanin hevur givið mær nógv ríkari mál, sigur Magnus Tausen.

> Eg vildi verða timburmaður. Kanska var hetta mín lítli ungdómsuppreistur

Frá barnsbeini av er hann komin nógv í samband við stóru skúlarnar í Havn. Fólkaskúlaárini gekk hann í Venjingarskúlanum, meðan pápin var varaskúlastjóri í Eysturskúlanum. Tá hann hevði tikið prógv á Føroya Læraraskúla í 1998, fekk hann so starv í Kommunuskúlanum. Bara tvær ferðir hevði hann verið á gátt í Kommunuskúlanum, áðrenn hann fekk starv har.

Soleiðis var hjá mongum næmingum í høvuðsstaðnum. Hoyrdi tú ikki til á einum skúla, komst tú ikki á gátt har, tí tú hevði onki at gera har. Men frá 1. august situr Magnus Tausen so yvir øllum landsins lærarum og næmingum og skal teirra vegna samskipa Føroya Skúlabókagrunn, Landsmiðstøðina og KT-depilin í ein munagóðan vitanardepil.

Tey flestu halda ivaleyst, at Magnus Tausen altíð ætlaði at gerast bókligur. Men so er ikki. Í fólkaskúlanum droymdi hann hvørki um mál, krit, tímatalvur, fakfeløg ella skúlabøkur.

– Eg droymdi bara um at sleppa at smíða. Eg vildi verða timburmaður. Kanska var hetta mín lítli ungdómsuppreistur, men hann vardi ikki so leingi, tí tá fólkaskúlin var av í 1988, fór eg í Hoydalar. Tá brast snikkaradreymurin, sigur Magnus flennandi.

## Lærdi hjá Shell

Eftir lokið studentaprógv í 1991 fór hann í læru sum skrivstovumaður hjá Shell. Har var nógv gongd í, og starvsfelagarnir vóru dugnaligir. Enn minnist hann tøgnina, tá starvsfólkini stóðu uppi yvir útvarpslurtinum 6. oktober í 1992 og frættu, at Føroyar vóru settar undir umsiting. Tað, sum síðan hendi, var als ikki stuttligt.

– Oljufeløg koma í samband við nógv vinnuvirkir og nógvar privatpersónar. Tá kreppan var í hæddini, upplivdu vit reina armóð, og tað var hart at síggja. Shell bar seg eftir mínum tykki menniskjaliga at, men eg ásannaði, at handilslívið var ikki akkurát eg, og tí fór eg á Føroya Læraraskúla í 1994, greiðir Magnus Tausen frá.

Á Læraraskúlanum treivst hann illa tað fyrsta árið og ætlaði sær at gevast. Men so rann saman millum hann og konuna, Sóleyð. Tá fór hann at trívast betur, og næstu trý árini vóru góð. Eftir loknu útbúgvingina í 1998 og fyrstu árini sum lærari í Kommunuskúlanum